# Bóndatátturin

Nú skulu garðarnir verða seldir.
  – *Mínir vinir eru fá.*
Bøndirnir standa sum í einum eldi.
  – *Tað er ikki ein í blant tjúgu,*
  *sum man kann líta á.*

2. Ein býr bóndin í Laðangarði,
føtirnir eru sum afturbein á haru.

3. Ein býr bóndin við Kvíggjá
føturnir sum á uppslitnum líggja.

4. Ein býr bóndin á Kálgarðsbakka
við skeivari tá og krøktum nakka.

5. Ein býr bóndin í Smillum,
hann reikar um bøin sum tík á illum.

6. Ein býr bóndin á Skála.
Hann eigur skilling, men ongan dála.

7. Ein býr bóndin í Toftum,
hann tryglar keks frá fransmonnum oftum.

8. Ein býr bóndin á Nesi.
Hann gongur í klássum við ongum æsum.

9. Ein býr bóndin Uttan Heyga.
Hann dugir einki annað uttan songarfugl at fleyga.

10. Ein býr bóndin í Bøkkum –
hann krýkir í lúsum sum grunningshøvd í møðkum.

11. Ein býr bóndin á Heyggi –
hann dartar við velinum sum antarsteggi.

12. Ein býr bóndin í Gjørðum –
hann gongur um bøin sum Grýlan á Gørðum.

13. Eg veit ein bónda, men ikki navnið –
hann ætlar sær á ferðini við hvítum ravni.
 –Der fandt man ein blant tjúgu,
  sum veit sær nakað ráð

14. Hann skal sær til Virginia fara.
Hvørki at skumpa tøð ella tara.

15. Hann skal sær inn í Sevastopol
at skumpa salt og lutra vitreol.
 – Der fandt man ein blant tjúgu
  sum visti nakað ráð.

21. mai 1777 kom reglugerð, ið ómynduggjørdi tann fátæka mannin, sum onga jørð átti, ella onki handverk hevði at vísa á. Vildi hann giftast, mátti hann, og kanska gentan við, tæna bóndanum í minst 4 ár og haraftrat hava gott viðmæli frá bóndanum. Við hesi reglugerð var bóndanum vissað bílig arbeiðskraft, og vónandi fór hitt stóra undirskotið við kgl. handilin í 1770 so ikki at taka seg upp aftur.

Í 1845 var Poul Johannes giftur. 11. nov 1846 fór við reglugerðini lógin av 1777 úr gildi til stóra gleði fyri vanlig ungfólk, og hevur Poul Johannes gingið kykur eftir at sleppa framat við einum priki til bøndurnar. Onki er at ivast í, at hetta var ein eggjan og grund til bóndatáttin, sum tá var yrktur. (Eftir Elsebeth Vestergaard: Feðgarnir Miðgerða Poul og Poul Johannes). jd.